# n hjá SEV



*Skipá: framvið Dúvugørðum og út í Pollin, turrløgd*



*Gellingará: vestanfyri Kvíggjarhamar, turrløgd*



*Fossá – vakrastu og hægstu fossar Føroya verða turrlagdir*



*Stórá í Tjørnuvík, verður turrløgd*



*Norðantil Víkavatn er sandstrond*



*Brekká í Sjeyndum verður turrløgd*

verður 3 faldað um 20 ár við verandi gongd hjá ídnaðar-londunum.

Í dec. 2009 verður »veðurlagstoppfundur« millum flestu heimsins lond í København. Sum skilst ætla vit eisini at vera umboðað.

Vit hoyra javnan frá okkara »serfrøðingum av ymiskum slagi«, at vit eru ein av heimsins mest dálkandi londum, hvat CO2 útláti viðvíkur.

Til hetta skal viðmerkjast, at ein ógvuliga stórur partur av hesum útláti stavar frá fiskivinnuni, sum framvegis er okkara høvuðsvinna.

Á hesari veðurlagsstevnu mugu umboð okkara ikki standa undirbrotlig við omanfyri nevnda pástandi, men krevja, at CO2 útlát frá fiskivinnuni verður hildið fyri seg.

Á landi framleiða varandi orkukeldur næstan helmingin av el-nýtslu okkara og vit eru á einum 5. plássi í Europa hesum viðvíkjandi (Hákun Djurhuus, SEV stjóri í Punktum 11/4-2008. Hetta er enntá áðrenn Eiði 2 verður liðugt útbygt.

Hava vit tá eisini áðrenn nevndu veðurlagsstevnu í dec. í 2009 í København t.d. gjørt reglugerðir fyri bjálving av húsum og bygningum umframt bannað privatkoyring sunnudagar, kanska ikki hvønn, men 2. ella 3. hvønn, hava vit gjørt meira enn nakað av teimum londum, sum vera á nevndu veðurlagsstevnu og kunnu tí – í staðin fyri at standa undirbrotligir móti heimsins londum – biða tey tá ”leggja knørr við knarra borð”

## Nýggj tøkni

Við høgu oljuprísunum fyrr í ár og umhvørvistjakinum er ferð aftur sett á gransking í varandi orkukeldum.

Orkuverk, ið nýtir sjóvarfallið sum drívmegi er uppfunnið í Bretlandi og kemur skjótt á marknaðin.

Tøknin við vindmyllum og sólkyknum batnar alla tíðina, soleiðis at um heilt få ár hevur nýggja tøknin at vinna orku frá sjóvarføllum, aldum, vindi og sól yvirhálað vatnorkuna sum umhvørvisvinarliga og nógv bíligari el-framleiðslu.

## Einkarrætturin hjá SEV

Veruliga orsøkin til vatnorkuætlanirnar hjá SEV er at styrkja støðu sína áðrenn einkarrættur teirra til vatnorkuna gongur út í 2013 uttan mun til at nógv tann dýrasta øking av el-orkuni er at útbyggja vatnorkuna og sum eisini ger størstu oyðileggingarnar í náttúruni.